## Evropa frystir

Veturin hevur av álvara gjørt vart við seg um stórar partar av Evropa ta seinastu tíðina. Í Bretlandi hevur tað ikki verið so kalt í næstan 30 ár. Fleiri túsund skúlar eru stongdir, og samferðslan er nógv darvað. Eitt nú eru nógvar flogferðir til og úr London seinkaðar. Í Pólandi hevur kuldin verið niðri á 22 kuldastigum, og har eru umleið 100 heimleys fólk deyð av kulda. Eisini í Norðurlondum er kalt. Í Danmark hava tað verið upp ímóti 18 kuldastigum, men í Noregi og Svøríki er nógv kaldari. Nærhendis Tróndheimi eru máld 41 kuldastig, og í Miðsvøríki hevur kuldin ligið millum 30 og 40 kuldastig.



## Íslendingar drekka minni

Íslendingar drukku heldur minni av rúsandi løgi í fjør enn árið fyri. Hagtølini vísa, at íslendingar keyptu 20 milliónir litrar, sum var 1,4 prosent minni enn í 2008. Av reyðvíni keyptu teir 2,5 prosent minni enn í 2008, men harafturímóti keyptu teir góð fimm prosent meiri av hvítvíni. Av brennivíni keyptu íslendingar 12 prosent minni í fjør enn í 2008, og sølan av blandaðum drykkjum minkaði heili 37 prosent, skrivar Vísir. 30. desember er stórur søludagur hjá rúsdrekkasølunum. Hendan dagin keyptu fólk næstan 280.000 litrar, men tað var kortini 14 prosent minni enn sama dag í 2008.





# Krevja roykvarnara í hvørt hús

**Roykvarnari kundi kanska havt bjargað tveimum børnunum, ið brunnu inni í Nivå í Danmark 2. jóladag. Fleiri dømi eru eisini um hetta í Føroyum, og nú verður arbeitt við kunngerð, sum fer at krevja roykvarnara í hvørt hús**

ROYKVARNARI
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

»Bíligasta lívstryggingin, sum finst«, verður sagt um roykvarnarar. Men gott 20 prosent av øllum heimum í Danmark hava ongan roykvarnara, og hóast tað í Føroyum ikki eru nøkur hagtøl um hetta, kann væntast at støðan er lítið øðrvísi.

Í Danmark er kjakið um roykvarnarar av álvara blussað upp aftur, eftir at tvey børn brunnu inni í Nivå 2. jóladag. Kanningar hava síðani víst, at eingin roykvarnari var í húsunum, og sambært hagtølunum kundi ein slíkur havt bjargað teimum.

Donsk hagtøl vísa, at í umleið 85 prosentum av førunum , har fólk doyggja í eldsbruna, er eingin roykvarnari í húsunum.

Hóast eingi hagtøl eru í Føroyum um hetta, heldur Petur Lava Olsen, deildarstjóri í Brunaumsjón Landsins, at hetta er á einari leið.

- At siga, at nakar doyr, tí eingin roykvarnari er, kunnu vit gita. Vit vita fleiri dømi um tað, har fólk og børn doyggja í eldsbruna, og har eingin roykvarnari er. Vit vita eisini um fleiri dømi, har fólk eru bjargað undan eldsbrunanum, har roykvarnari er í húsunum, sigur Petur Lava Olsen.

### Vinnur nógva tíð

Tá eldur er í, ferðast roykurin langt áðrenn eldurin. Petur Lava Olsen greiðir frá, at ein roykvarnari varnast eldin heilt tíðliga í roykfasuni, og at tað tí er í heilt góðari tíð, at roykvarnarin ger vart við seg.

- Tað er somikið tíðliga, at tá er enn somikið av luft eftir, at tú klárar út. Tað er koliltuininnihaldið (CO) í luftini, sum fer beinleiðis í blóðið, og sum tú heilt knappliga fellur í óvit av, og so tíðliga í roykfasuni er innihaldið av hesum enn sera lágt, staðfestir Petur Lava Olsen.

### Í hvørt einasta hús

Petur Lava Olsen sigur frá, at í løtuni verður arbeitt við at leggja seinastu hond á eina kunngerð um brunaverju og brunatrygd. Nýggja kunngerðin fer at krevja roykvarnarar inn í hvørt einasta hús í Føroyum, har fólk búgva.

Hetta má kallast veruligt stórlop, tá Føroyar í nógv ár hava verið, og enn eru einasta Norðurland, sum onga lóg hava um roykávaring. Í Danmark og øðrum Norðurlondum er krav, at í øllum nýbygningum skal roykvarnari setast upp.

### Má kannast regluliga

Petur Lava Olsen greiðir frá, at eitt er at roykvarnarar eru settir upp í húsunum, meðan annað og nógv meiri umráandi er at halda teir viðlíka og kanna teir.

- Har eru fýra punkt, sum mugu gjøgnumgangast av og á. Eitt er at taka við dustsúgvaranum eftir honum av og á, næsta er at royna hann við royndarknøttinum av og á. Triðja punktið er at skifta battaríið hvørt ár, meðan fjórða punktið er, at roykvarnarin má roynast av og á við onkrum royki, sigur Petur Lava Olsen.

### FAKTA
### UPPSETAN AV ROYKVARNARUM

Roykalarmar verða settir upp undir loftið, so tætt við miðjuna á rúminum sum møguligt. Teir skulu vera í minsta lagi 30 cm frá vegginum og frá lampum. Tryggja tær at roykalarmurin verður settur upp har tú hevur møguleika fyri at hoyra hann – eisini um tú svevur. Hevur tú sjónvarp á kamarinum, eigur tú eisini at hava roykalarm har. Tú eigur í minsta lagi at hava ein roykalarm á hvørji hædd í húsunum og ein í hvørjum sovikamari.

*Kelda: Gummibátatænastan*

# Smuglararuta til Føroya og Íslands avdúkað

**Tveir litavar sita í varðhaldi í Føroyum og tríggir í Íslandi skuldsettir fyri at hava smuglað rúsevni**

RÚSEVNI
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Í longir tí hava tveir litavar sitið varðhaldsfogslaðir í Føroyum, skuldsettir fyri at hava smuglað rúsevni.

Kriminalpolitiið hevur lagt tætt lok oam á málið og vil ikki upplýsa tað minsta um, hvat menninir eru skuldsettir fyri at hava gjørt.

Men úr Íslandi frætta vit, at har sita tríggir litavar, tveir menn og ein kvinna, varðhaldsfongslaðir í sama máli. Tey trý fólkini eru í trítiárunum.

Politiið í Føroyum, í Litava, Europol og tollmyndugleikarnir í Íslandi samstarva um at greiða út málið.

Tey fimm fólkini eru undir illgruna fyri at hava smugað rúsevni til Íslands, men vóru á vegnum upp í Føroyum. Rúsevnini vórðu krógvað í bilum teirra, men tey vóru funnin, tá ið bilarnir vóru í Føroyum. Bilarnir fóru tó víðari.

Funna nøgdin av rúsevnum var stór: Trý kilo av amfetamini og 4200 ecstasy-tablettir.

Sum skilst hava somu menn áður roynt at smugla 10 kilo av rúsevnum til Íslands, men teir vórðu steðgaðir.